Tað hevur avgjørt styrkt TB-liðið, at Magni Hentze aftur er tøkur at verja málið

Kósin er sett

2. deild: Tvørámenn hava rættuliga fingið ferð á spælið, og eru nú einsamallir á odda

JÁKUP MØRK

TB-KÍ 5-2

Aldursforsetin í føroyskum fótbólti, TB, hevur í ár sent greið boð um, at teir ætla sær upp aftur í fremstu røð í føroyskum fótbólti. Fyrstu dystirnar var spælið tó eitt sindur trilvandi, men í seinastuni hevur verið líkt til, at boðini av Tvøroyrir skulu takast í álvara.

Einki gestablidni

Leygardagin vóru tað klaksvíkingar, sum stóðu fyri skotum, tá teir bæði ferðamóðir og ringir í sjóverki komu á Sevmýru at spæla dyst.

Tvørámenn tóktust tó ikki geva sær far um, at onkur av mótstøðumonnunum var eitt sindur illa fyri. Í øllum førum gjørdu teir ikki nakrar royndir at fáa gestirnar at kenna seg vælkomnar á vøllin.

TB setti seg nevnliga ruddiliga á dystin longu í fyrra hálvleiki, og ikki gekk long tíð, áðrenn bólturin lá í KÍ málinum. Hetta hendi, tá beinini vórðu tikin undan Dan Mortensen í kriminella økinum, og landsliðsmaðurin, Óli Johannesen setti brotssparikið trygt í netið.

Einar Petersen skoraði til 2-0, eftir eitt vakurt og skjótt spælt TB álop, har bólturin at enda varð rullaður til Einar, sum bert skuldi seta innarusíðuna á bóltin.

Nakað seinni eydnaðist tað Fríðin Ziskason at minka um munin fyri KÍ, men gleðin var stokkut, tí áðrenn steðgin hevði Bogi Johannesen, sum er heima í summarfrí, aftur økt munin upp í tvey mál, tá hann var fyrstur á innleggi.

Tá støðan var 2-0, fekk KÍ annars tillutað brotsspark, men Allan Joensen misnýtti tilboðið.

Vunnu við níggju

Fyrsta korterið av seinna hálvleiki skeyt Óli Johansen tvey mál afturat. Tað fyrra upp á beinleiðis frí-spark, meðan 5-1 málið var eitt úrslit av triðja brotssparkinum í dystinum.

Dysturin var nú so ruddiliga avgjørdur, og tá KÍ innan tríggjar minuttir misti Meinhard Hansen og Jón Havn, sum báðir fingu reyða kortið, var líkt til, at talan skuldi gerast um rættuliga sorl.

TB hevði eisini hópin av møguleikum eftir hetta, men neyvleikin var als ikki til staðar, og í-staðin kundi KÍ minkað um munin móti endanum, ta Jóhannis Færø setti bóltin í netið.

Sostatt tapti KÍ 5-1, tá teir vóru ellivu á vøllinum, meðan teir vunnu 1-0, tá teir í nærum hálvan tíma vóru 9 móti 11.

TB tykist nú rættuliga hava sett kós móti fyrstu deild. Byrjanin var heldur óstøðug, men í løtuni tykjast teir uttan iva at vera besta boðið til ein uppflytara.

KÍ skal hinvegin skava sær nøkur stig saman nakað skjótt, áðrenn teir koma í veruligan niðurflytingarvanda. So galið man tað neyvan fara at ganga, tí liðið telur fleiri leikarar, sum seinnu árini hava staðið sg væl í bestu deildini, og sum framvegis høvdu gjørt tað, um nóg nógv varð lagt fyri í venjingini.

TB-KÍ 5-2 (3-1)

1-0: Óli Johannesen (br.)
2-0: Einar Petersen
2-1: Fríðin Ziskason
3-1: Bogi Johannesen
4-1: Óli Johannesen
5-1: Óli Johannesen (br.)
5-2: Jóhannis Færø

VB skal takast í álvara

Við sigrinum á B36 hevur VB av álvara blandað seg í oddastríðið. Hinvegin tykist B36 fullkomuliga hava mist takið

Leikandi venjarin hjá VB, Krzystof Poczynzki, var ikki nøgdur við dystin. - Úrtøkan hjá okkum í mun til málmøguleikarnar var alt ov lítil, segði venjarin eftir dystin

Mynd: Áki Bertholdsen

JÁKUP MØRK

VB-B36 1-0 (1-0)

Sálarliga barlastin hjá B36 mundi vera í lagi, tá teir sunnudagin fóru á vøllin móti VB.

Gaman í hevur VB í ár verið millum stinnastu liðini í deildini, men hinvegin hevði B36 ikki tapt á Eiðinum síðani 1989, útlitini fyri í hvussu so er øðrum stiginum mundu vera góð.

Tá tað kom til stykkis, hevði nútíðin tó vunnið á siðvenjuni, tí havnarmenninir máttu stigaleysir av aftur oynni, og sum heild mundi hetta eisini vera í lagi.

Eingin framdrift

B36 byrjaði annars dystin væl, og meginpartin av fyrra hávleliki vóru tað eisini teir, sum høvdu bóltin meira.

Rættuliga vandamiklir gjørdust teir tó ongantíð, og tað sigur eitt sindur um spæl teirra, at tað einamest var við hornasparksstøðum, at teir veruliga hóttu VB málið.

Heimaliðið tóktist hinvegin nógv meira beinleiðis í spæli sínum. Tá teir fóru í álop, var tað við fullari ferð, og fleiri ferðir stóðust góðir málmøguleikar burtur úr, tá teir soleiðis herjaðu á B36 verjuna.

Einasta málið í dystinum, kom tó ikki sum úrslit av einum av mongu kviku álopunum. Eitt sindur óneyðugt lat B36 hornaspark til VB, og at kalla ótarnaður kundi Jóan Pauli Olsen senda bóltin í netið, tá sent varð innfyri.

Møguleikarnir trutu ikki

Um onkur helt, at B36 nú fór at leggja veruligt tryst á heimaliðið í seinna hálvleiki, so fór viðkomandi púra skeivur í hesum.

Úr Vági frætta vit, at størsti spurningurin seinastu trý korterini var, nær VB skuldi sláa sigurin fastan, við einum máli til 2-0.

Hetta hendi ongantíð, men tað var so ikki orsakað av, at heimaliðið ikki hevði nóg nógvar møguleikar.

Snøgt sagt, so svumu VB leikararnir í málmøguleikum, men Tróndur Vatnhamar vann fleiri ferðir tvídystir, tá VB leikarar komu púra einsamallir móti máli hansara.

B36 miðvøllurin fekk ongantíð tamarhald á spælinum. Kanska mest orsakað av, at Jan Guttesen hevði ein av sínum fáu vánaligu dystum, og so hjálpti tað ikki nógv, at ungi Klæmint Matras spældi ein rimmar dyst við síðuna av Jan.

Hóast teir søgdu sigurin vera í lagi, so tykjast B36 leikararnir ikki vera samdir við teimum, sum siga at liðið í løtuni er í djúpari kreppu. Toppskjúttin tey bæði seinastu árini, Jákup á Borg, segði eftir dystin, at hann helt als ikki, at talan er um nakra kreppu á liðnum.

- Undan kappingarárinum var tað so at siga eingin, sum roknaði við, at vit skuldu gera nakað serligt í ár, so eg haldi ikki, at man kann tosa um nakra kreppu hjá okkum, greiddi hann frá.

Hann var tó sjálvandi samdur í, at vónirnar kanska vóru settar nakað upp, tá teir fingu so góða byrjan, við fimm sigrum á rað, men teir eru so framhaldandi partur av oddastríðnum.

Nøgdur og tó

Hóast fyrsta sigurin á B36 í 11 ár, so var leikandi venjarin hjá VB, Krzystof Popczynzki, ikki heilt nøgdur við dystin.

- Eg eri sjálvandi nøgdur við at fáa trý stig, men hinvegin misnýttu vit alt ov nógvar málmøguleikar, og tað kann eg ikki vera nøgdur við. Tá vit hava so nógvar 100% møguleikar, eigur úrtøkan at vera betri, soleiðis at eingin ivi verður um sigurin.

Venjarin hevði hug at samanbera dystin sunnudagin við tann, sum VB fyrr í ár tapti móti B71, men segði tó, at munurin var, at teir hóast alt fingu stigini við sær hesuferð.

- Hetta var tó ein sera týdningarmikil sigur fyri okkum. Nú er vit av álvara við í toppstriðnum, og megna vit eisini at vinna móti Sumba komandi vikuskifti, verður hugurin at venja í summarfrítíðini eisini nógv betri, helt Krzystof fyri.

Víðari segði hann, at sum støðan í oddinum er í løtuni, verður helst talan um eina sera spennandi seinnu kappingarhálvu, har øll fimm ovastu liðini hava møguleika at gera rættuliga vart við seg.

Ræður um at halda fast

Sum nevnt, so er seinasti dysturin hjá vágbingum á heimavøllli móti Sumba á Jóansøku. Einki er at taka seg aftur í, at VB eru greiðir favorittar at vinna dystin, og um so er, standa teir í eini sera góðari støðu, áðrenn átta teir seinastu dystirnar.

Einasta av oddaliðunum, sum VB framvegis hevur til góðar at møta á útivølli er B36, meðan teir á heimavølli fáa vitjan av KÍ, B68 og HB. Um ein hampuliga góð úrtøka fæst úr hesum trimum dystunum, eru útlitini fyri eini endastøðu uppi oddinum helst á eini góðari leið.

B36, sum fyrsta partin av kappingini sá út til at skula verða einaráðani í deildini, tykist hinvegin at vera steðgað rættuliga á seinastu vikurnar.

Fyrst og fremst tykist missurin av John Petersen at hava verið størri, enn flestu áskoðararnir upprunaliga góvu sær far um, men harafturat hevur liðið eisini verið meint rakt av skaðum.

Ivaleyst eru flestu av skaddu monnunum komnir fyri seg, tá tørnað verður út aftur eftir summarsteðgin, men áðrenn ´summarfrítíðina hevur B36 útidyst í Gøtu. Ein dystur, sum helst skal vinnast, um vónirnar um ein oddasess skulu varveitast.

VB-B36 1-0 (1-0)

1-0: Jón Pauli Olsen 40.

Dómari: Petur Reinert

B36:

Tróndur Vatnhamar – Fróði Clementsen, Egil Zachariassen, Jens Kristian Hansen – Dánjal Petur Johansen, Klæmint Matras, Jan Guttesen, Håkan Lundholm – Jákup á Borg, Ronnie Samulelsen, Magni á Lakjuni

VB:

Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Tórður Holm, Jón Gærdbo, Milan Kulic, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Krzystof Popczynzki

Arnold setti futt í klaksvíkingarnar

Vágaliðið kom á odda, men síðsta hálva tíman høvdu teir millum lítið og einki at bjóða uppá

At saknurin í Arnold hevur verið stórur hjá KÍ er einki at ivast í. Sunnudagin kom hann á vøllin í seinna hálvleiki, og hetta gjørdi munin í dystinum
Mynd: Álvur Haraldsen

Klaksvíkingar eru framvegis við í kappingini um meistaraskapin. Teir vunnu 4–1, tá FS Vágar vitjaði sunnudagin, men KÍ kennir framvegis stórt tríst á sær. HB er oddalið, og so leingi, sum teir vinna sínar dystir, er tað lívsneydugt hjá KÍ at fáa fulla úrtøku hvørja ferð.

Hesa ferð fingu teir ein kvøkk tíðliga í 1. hálvleiki. FS Vágar var heilt týðuliga komið til Klaksvíkar at dyrgja eftir javnleiki. Teir høvdu nógv fólk aftarlaga á vøllinum, og teir vóru tættir í verjupartinum. Fyrirtreytirnar fyri taktiska uppleggjinum styrknaðu uppaftur meiri, tá John Johansen legði gestirnar framum.

Málið stóðst av eftir fínt snarálop. Klaksvíkingar vóru frammarlaga, tá teir høvdu hornaspark. Vágamenn spældu skjótt út frá málinum, Tór–Ingar Akselsen, sum er mest eyðsýndi vágamaðurin í álopspartinum, streyk avstað í høgru, tá Marek akkurát ikki fekk fatur á honum. Nakað inni á KÍ hálvuni sleppti Tór–Ingar bóltinum inn á miðásin til John Johansen, sum dróg eitt sindur, áðrenn hann potaði bóltin framvið Zoltan, ið kendi seg noyddan at fara eitt sindur út úr málinum.

Gestirnir fegnaðust. Teir høvdu umskipað liðið, men í fyrra umfarinum tóktist tað ikki at bila. Miðvingurin Pól Kjartan Thomsen var fyri fyrstu ferð við frá byrjan – hann var vongverji í høgru – Eyðfinn Fjalsbak var í miðverjuni saman við Darius (Zilva var leikbannaður), og FS Vágar hevði nógv fólk á miðvøllinum. Birgir Joensen var einsamallur heilt frammi. John Johansen var hangandi álopsmaður, Sonni Johansen var í vinstra og Tór–Ingar Akselsen í høgra borði, og Albert Ari Thomassen og Hannus Olsen royndu at fylla mitt fyri.

Fluttu seg ov lítið

Leiðslumálið hjá FS Vágum órógvaði heilt týðuliga heimaliðið. Klaksvíkingar høvdu bóltin meiri enn tríggjar fjórðingar av tíðuni, men teir høvdu ilt við at spæla seg til møguleikar.

Rógvi Jacobsen skuldi vera miðframherji og harvið lúra eftir møguleikunum í brotsteiginum. Men stílurin og lyndi hjá evnaríka mannin eru ikki í Kurt Mørkøre stíli at bíða og vera lítið í spælinum. Rógvi fór, sum hann plagar, aftur á vøllin fyri at taka lut í uppspælinum. Ætlanin var, at Marek skuldi vera verjukendur miðvallari aftanfyri Jan Joensen og Kristian á Lakjuni, men tað tóktist koma fløkja í, tí Marek lá ofta aftanfyri miðverjarnar báðar.

Sendingarnar tvørturum og aftureftir góvu ikki nógv, men tað eydnaðist klaksvíkingum at javna undan steðginum. Úti í brotsteiginum endaði luftdystur millum Rógva Jacobsen og FS Vágar málverjan Remi Mikotionis við, at innlegg úr vinstru datt niður á vøllin. Harley Bertholdsen var fyrstur á, og úr fjúrtan metrum sendi hann í meskarnar.

Arnold setti ferð í

2. hálvleikur var ikki serliga gamal, tá KÍ framdi tvær útskiftingar. Srecko, sum higartil ikki hevur verið tann álopsstyrkurin, sum tað var roknað við, kom á vøllin fyri Kristian á Lakjuni. Tá fór Rógvi Jacobsen aftur á miðvøllin, meðan Srecko gjørdist miðverji.

Løtu seinni kom Arnold Joensen, sum hevur verið skaddur í nakrar vikur, á vøllin fyri sináskadda Marek, og tá var tað, at tað orduliga glapp hjá KÍ. Arnold tóktist frá beinkinum at hava lisið av, hvat skuldi til fyri at toga mótstøðuverjuna sundur. Hann spældi skjótt og neyvt, reikaði nógv, og tordi at bjóða av. At hann megnaði at sneiða ein og tveir mótstøðumenn av sær, hevði við sær, at vandamiklar støður stóðust av, og tað bar við sær, at KÍ fekk trý mál afturat.

Ove Nysted átti eisini stóran leiklut. 2–1 málið skoraði Ove Nysted, eftir uppspæl í høgru og innlegg frá Arnoldi Joensen. 3–1 málið var brotsspark. Harley Bertholdsen var tryggur úr ellivu metrum, eftir at Ove Nysted var feldur.

Og tá KÍ staðfesti sigurin, vóru tað aftur teir báðir Arnold Joensen og Ove Nysted, sum vóru høvuðsleikarar. Arnold Joensen var staddur í vinstru, tá hann sendi innfyri málið. Har var Ove, sum var staddur einar seks ella sjey metrar úr málinum, so mikið leysur, at hann fekk loyvi at sjonglera við bóltinum nakrar ferðir, áðrenn hann smekkaði í kassan.

Klaksvíkingar høvdu bara ein annan stóran møguleika. Støðan var 2–1, tá Srecko var spældur púra blankur. Hann valdi at smekka til, og málverjin, sum var komin út ímóti honum, hálvbjargaði. Hevði sjálvsálitið og tryggleikin hjá frremmanda KÍ manninum verið størri, so h evði hann ivaleyst valt at lyfta upp um málverjan. Komandi sunnudag skal KÍ til Runavíkar. Har hevur tað ikki altíð gingið so væl hjá teimum, men KÍ kennir treytirnar. Um teir skulu hugsa um FM, so skulu teir vinna. Vágamenn kenna eisini treytirnar. Um teir skulu sleppa undan niðurflytingarhóttanini, sum hevur hingið yvir teimum alt kappingarárið, so skulu teir fáa stig og helst vinna, tá B68 kemur vestur.

JH

KÍ-FS Vágar 4-1 (1-1)

0-1: John Johansen 10.
1-1: Harley Berholdsen 20.
1-2: Ove Nysted 73.
3-1: Harley Bertholdsen (br.)79.
4-1: Ove Nysted 86.

Dómari: Kim Ejdesgaard

KÍ:

Zoltan Kojundzic – Harley Bertholdsen, Andrzej Pacek, Jan Andreasen, John Ryan – Jan Joensen, Marek Wierbzbicki, Kristian á Lakjuni – Ove Nysted, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni

FS Vágar:

Remi Mikotionis – Pól Kjartan Thomsen, Darius Magdisauskas, Eyðfinn Fjalsbak, Rimvadis Bakus – Tór–Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Albert Ari Thomassen, Sonni Johansen – John Johansen, Birgir Joensen

B36 vann grannauppgerð

2. deild: Næstbesta B36 liðið vendi gongdini, tá teir í grannauppgerðini smurdu HB av

JÁKUP MØRK

B36-HB 5-1 (1-0)

Seinastu vikurnar hevur verið líkt til, at næstbesta liðið hjá HB rættuliga skuldi fara at gera um seg aðrur deild.

Byrjanin var einki serlig fyri teirra viðkomandi, men seinastu úrslitini hava verið góð, og onkur hevur eisini tosað um møguleikan fyri at vinna heiðursmerki í deildini.

Hjá grannunum í B36 hevur gongdin verið júst tann øvugta. Fyrstu umførini var liðið so avgjørt millum tey bestu í deildini, og millum annað varð TB sent heim við einum dyggum tapi. Síðani gekst heldur striltið, og seinastu vikurnar er bortnurin á talvuni komin í so nær hjá árstalsfelagnum.

Bit í B36

Við hesum í huga, saman við teirri sannroynd, at HB aloftast hevur gott tak á grannunum, var kanska væntandi at HB skuldi vinna tryggan sigur leygardagin.

Helst vóru spælararnir av somu fatan, men í hesum fóru teir so sanniliga skeivir. B36 var tað av liðunum, sum byrjaði dystin nógv betri. Teir vóru fyrstir á so at siga øllum bóltum, og harumframt fingu teir eisini spælið at hanga bógv betri saman.

Burtur úr yvirvágini fingu teir eisini eitt mál í fyrra hálvleiki, tá skjótt mótálop endaði við, at Brynleif Hansen kundi skall bóltin í netið.

Í seinna hálvleiki helt gongdin fram, og Tað eydnaðist teimum eisini at økja um leiðsluna, tá mistak í HB verjuni viðførdi, at Johnny Samuelsen bródliga gjørdist púra leysur í HB brotsteiginum.

HB leikararnir vóru tó ikki einsamallur um at gera mistøk í verjupartinum, tí lítla løtu seinni stóð Eyðun Samuelsen púra leysur í HB brotsteiginum, soleiðis at hann kundi minka um munin.

Luftin fór

Eftir hetta kom HB meira við í dystin, og teir høvdu eisini møguleika at vinna upp á javnt, men hóast fleiri vandamiklar støður, so eydnaðist hetta kortini ikki.

Ístaðin slapp B36 upp á 3-1, tá verjuleikari var so óhepping at senda bóltin í egið mál, og so var liðugt hjá HB.

Sjálvmálið tók so at siga seinastu luftina úr reyð/svarta havnarliðnum, og seinastu løtuna av dystinum hevði B36 lætt spæl.

Brynleif Hansen fekk enn eitt mál, tá hann varð spældur púra leysur, og rak fram við málverjanum áðrenn hann legði bóltin í netið. At enda kundi Gunnar Nielsen, sum helst mundi vera besti maður á vøllinum, seta krúnuna á verkið, tá hann fyrst dróg frá verjuleikara við hælinum, áðrenn hann sendi eitt beinrakið skot í meskarnar.

Við sigrinum slapp B36 sær aftur upp á ovaru hálvur á stigatalvuni, og megna teir eisini at vinna í Leirvík komandi vikuskiftið, eru teir aftur partur av málmstríðnum.

HB datt hinvegin nakað niður á talvuna, og komandi dysturin, á heimavølli móti ÍF, man helst fara at vísa, hvørt ætlanir teirra um heiðursmerki skulu takast í álvara ella ikki.

B36-HB 5-1 (1-0)

1-0: Brynleif Hansen
2-0: Johnny Samuelsen
2-1: Eyðun Samuelsen
3-1: Sjálvmál
4-1: Brynleif Hansen
5-1: Gunnar Nielsen